


# Grannskoðari

*Grannskoðan • Roknskap • Bókhald • MVG • Skat • Ráðgeving*

Vegna vaksandi virksemi søkir Roknskaparfelagið eftir einum ungum dugnaligum og fryntligum grannskoðara, sum hevur sum mál at gerast skrásettur grannskoðari.

STARVIÐ
Arbeiðið fevnir um bókhald, roknskap og grannskoðan og eina røð av øðrum uppgávum, ið hava tilknýti til hetta arbeiði.

Tú hevur HH-prógv ella aðra líknandi útbúgving. Samstundis er tú tilreiðar at fara ella ert farin undir HD-útbúgving í roknskapi og føroyskum skattarætti 1 og 2. Tær neyðugu minst 3 ára starvsroyndirnar fært tú hjá okkum. Eftir at hesar útbúgvingar eru loknar, er møguleiki um at søkja um at gerast skrásettur grannskoðari.

Um tú tekur prógv í summar, ert tú eisini vælkomin at søkja.

VIT BJÓÐA
Vit bjóða eitt fjølbroytt, avbjóðandi og spennandi starv við møguleika fyri persónligari og yrkisligari menning. Vit stuðla útbúgvingini við at gjalda fyri luttøkugjald, bøkur o.a. Løn eftir nærri avtalu, sum hækkar stigvíst við ávegisútbúgving og starvsroyndum.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Olaf Frits Joensen á tlf. 309400 ella um teldupost olaf@roknskap.fo. Starvið verður sett eftir nærri avtalu.

Umsóknir til starvið skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 21. juni 2007 og skulu sendast til:

Roknskaparfelagið spf.
J. C. Svabosgøtu 48
Postboks 2210
FO-110 Tórshavn

ella til teldupost roknskap@roknskap.fo

Roknskaparfelagið Sp/f er ein fyritøka, sum hevur til endamáls at veita dygdargóðar tænastur í samband við grannskoðan, roknskap, bókhald, mvg, skatt og ráðgeving. Vit leggja stóran dent á yrkisliga dygd og tætt samskifti við kundan.

Vit veita í dag tænastu til eitt rættiliga stórt tal av kundum, sum hava áhugamál bæði í Føroyum og uttanlands. Millum kundarnar eru P/f, Sp/f , Í/f, firma, yrkisfeløg, ítróttafeløg, limafeløg, einstaklingar o.o.

Fyri einum góðum ári síðan flutti skrivstovan í egin høli í J. C. Svabosgøtu 48 í Tórshavn.


# Portalurin setti met




Farna vika royndist væl Portalinum. Í veruleikanum vórðu tvey mett sett, bæði í brúkarum og sýndum síðum. Yvirlitið frá Gallup vísir, at portal.fo hevði 1,5 % fleiri brúkarar í farnu viku. Tað svarar til 44.644 brúkarar, sum íalt hava lisið 1.724.862 síður. Hetta er ein vøkstur uppá 18,4%. Talið av vitjanum var eisini høgt, men sló tó einki met hesaferð. Íalt hevði portal.fo 346.380 vitjanir ta seinastu vikuna. Landsdysturin móti Italia er helst orsøkin til metstóru tølini. Men onnur góð tíðindi hava helst eisini áhuga hjá einum breiðum skara av fólki.




# Skrivstovunæmingur

*Grannskoðan • Roknskap • Bókhald • MVG • Skat • Ráðgeving*

Vegna vaksandi virksemi søkir Roknskaparfelagið eftir einum ungum dugnaligum og fryntligum skrivstovunæmingi.

STARVIÐ
Arbeiðið fevnir um bókhald og skrivstovuhald og eina røð av øðrum uppgávum, ið hava tilknýti til hetta arbeiði.

Tú hevur HH- ella FHS- prógv ella aðra líknandi útbúgving. Um tú tekur prógv í summar, ert tú eisini vælkomin at søkja.

VIT BJÓÐA
Vit bjóða eitt fjølbroytt, avbjóðandi og spennandi starv við møguleika fyri persónligari og yrkisligari menning.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Olaf Frits Joensen á tlf. 309400 ella um teldupost olaf@roknskap.fo Starvið verður sett eftir nærri avtalu.

Umsóknir til starvið skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. juni 2007 og skulu sendast til:

Roknskaparfelagið spf.
J. C. Svabosgøtu 48
Postboks 2210
FO-110 Tórshavn

ella til teldupost roknskap@roknskap.fo

Roknskaparfelagið Sp/f er ein fyritøka, sum hevur til endamáls at veita dygdargóðar tænastur í samband við grannskoðan, roknskap, bókhald, mvg, skatt og ráðgeving. Vit leggja stóran dent á yrkisliga dygd og tætt samskifti við kundan.

Vit veita í dag tænastu til eitt rættiliga stórt tal av kundum, sum hava áhugamál bæði í Føroyum og uttanlands. Millum kundarnar eru P/f, Sp/f , Í/f, firma, yrkisfeløg, ítróttafeløg, limafeløg, einstaklingar o.o.

Fyri einum góðum ári síðan flutti skrivstovan í egin høli í J. C. Svabosgøtu 48 í Tórshavn.